
2009
www.
.fo
vodafone deildin
HAVSBRÚN
VS
FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TÓRSHAVN
Mánadag 13. apríl 2009
kl. 15:00 í Fuglafirði

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo





# FYRSTI HEIMADYSTUR Í VODAFONEDEILDINI

**Tað er sera spennandi, enduliga at kunna ynskja tykkum øllum, at vera vælkomin til Vodafonefótbóltsdyst í Fuglafirði.**

Fyrsti heimadystur hjá ÍF og Red Dragons í ár, er ímóti B36 og White Tigers úr høvuðsstaðnum, sum hava fingið eina góða byrjan uppá landskappingina, men eru úti av kappingini um Løgmanssteypið. Í fyrsta Vodafonedystinum vunnu B36 í Gundadali ímóti grannunum av Argjum, AB. Dysturin endaði 3-2 til B36 eftir ein sera spennandi dyst og tískil hava teir 3 stig á kontoini áðrenn dystin í dag. Seinasta hósdag skuldu B36 til Suðuroyar, at spæla steypadyst á Sevmýri ímóti TB. Hetta gekk minni væl, tí dysturin endaði 0-0 eftir vanliga leiktíð, 0-0 eftir yvirtíð og so var straffikapping á skránni. Straffikappingin endaði 8-7 til TB, og so var B36 úti av steypakappingini. Nýggi áleyparin hjá B36, Brima Koroma, var ikki við vegna skaða, og tað gjørdi kanska sítt til, at B36 ikki megnaði at fáa mál í dystinum.


Vit gera
- vegir
- gongubreytir
- tún
- parkeringsøkir o.a.
Vit planera
og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO 700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Johannes Rasmussen | Fartel. 220179


Alt plátu- og lakkeringsarbeiði
Gjørt skjótt & gott!
Ring og fá eitt tilboð!
Plátuverkstaðið
v/ Glenn Perdermo
Falkavegur • Tórshavn • Tel 321778
Mobil 221778 • plv@plv.fo


XL BYG
BORG
HEILDARVEITARI
TIL BYGGIVINNUNA
www.borg.fo


Tú og e – vinna hvørja ferð!
e KORT
5412 3456 7890 1234
ELI M KORTENSEN
MasterCard
Eik Banki P/F er e-kortútgevari
www.ekort.fo



Vitjið heimasíðuni hjá okkum!
www.
.fo
www.íf.fo




Nýggjasta mótan
finnur tú hjá Rokoko
Rokoko
Norðragøta - Tel 44 10 3




Áræði
Álit
Ábyrgd
grannskoðan | roknskapartænasta | skattaráðgeving | vinnuráðgeving
SPEKT statsaut. revisorar spf. grannskoða, veita roknskapartænastu og ráðgeva í skatta- og vinnuviðurskiftum. Hjá SPEKT starvast 25 fólk. Fýra teirra eru ríkisgóðkendir grannskoðarar. Vit arbeiða millum annað fyri einstaklingar, handilsfyritøkur, ídnaðarfyritøkur, kolvetnisfeløg, reiðarvirki, peningastovnar, tryggingarstovnar, kommunur og almennar stovnar.
SPEKT statsaut. revisorar spf. eru tilknýttir altjóða KPMG-kervinum av grannskoðara- og ráðgevingarvirkjum.
SPEKT statsaut. revisorar spf,
spekt@spekt.fo, www.spekt.fo
SPEKT
statsaut.
revisorar




Ein depil innan skipatænastur
www.mest.fo
At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.
Men MEST er eisini so nógv annað.
Vit bjóða m.a.
• Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
• Landsins størstu goymslu av eykalutum
• Projekt- og teknistovuarbeiði
• Stórar bedingar og turrdokk
• Leigu av sleipibátum og kranum
• Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)
MEST
MEST
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo




Restaurant
Muntra



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Elin Stampe tannrøktari

Viðtala:
8.00-11.00 og 13.00-15.00

Torkilskrókur 8  530 Fuglafjørður  tel. 444 358

VESTLAX

## KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI
INFORMATION OFFICE

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*
Tel 73 77 15 - Fax 44 51 80
FO-530 Fuglafjørður

t-post: infoey-f@post.olivant.fo

---

## FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN
FO-530 Fuglafjørður
Tel 73 77 16 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*



Ítróttarútgerð
Bíligt tape og ísposar
Lækna- og 1. hjálpstaskur

Sport Medical Products
aserve
www.a-serve.dk

## Álvaskot
Fysioterapiviðgerðarstova
530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44
Álvur Hansen, fysioterapeutur



Sp/f SEA-STAR DIVING

Fart.: 59 00 60 . Fart.: 59 77 60

Approved supplier by:
DNV
Lloyd's Register

- Reinsan og poleran av:
- Skipsskrokkum
- Skrúðum
- alinótum

- Digitalvideo/Foto Inspekt. av:
- Skipsskrokkum
- Havnarlegum

- Tjúgdarmátingar av:
- Tangum og Rørum
- Skipum
- Spunskajum

- Eisini taka vit okkum av:
- Rep. Sveisingar / Skering
- Skifta Anodir
- Skera av skrúðum
- Málingainspektiónir
- Uppmátingar
- Spreinging

- vit reisa um alt landið og uttanlanda!



Høvuðsskrivstovan: Heiðavegur 72 . P.O.Box 220 . FO-610 Saltangará . Faroe Islands . Tel.: 44 99 77 . www.sea-star.fo




VÆLKOMIN Í KATO




FONN FLOG

FO-700 Klaksvík · Tel 476363 · FO-600 Saltangará · Tel 476383
fonnflog@fonnflog.fo · www.fonnflog.fo

# Gartnaraarbeiði

- Flisaarbeiði
- Grasvallir (anlegg)
- Grasslåðing
- Røkt av grønum økjum
- Annað urtagarðsarbeiði
- Grevstur, velting, planering o.a við maskinu

www.gartnari.com

Búgvi Róin

210425

email: bugvi-r@post.olivant.fo

regve.com

Sp/f Grannskoðaravirkið

# INPACT

Løggilt grannskoðaravirki

R.C. Efferøesg. 26, Tórshavn
Tel 314700
Fax313815
Inpact@inpact.fo
www.Inpact.fo

Dygdararbeiðir við góðum prísum!





KLAUTOLAK.FO

Tlf. 75 87 87

Tryggingarskaðar, lakkeringar ella skifta forrútin?
- Ring altíð fyrst til okkum!

# Piddasahandil & Ribarhús

- listaframsýningar, tónleikatiltøk og skeið
- heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
- føroyskt bundið og tøvt í meturmál
- føroysk karða ull í fleiri litum
- heimalitað tógv og Snældu-tógv
- føroyskar fløgur og bøkur
- loppumarknaður

- og altíð ein kaffimuður við "heimabakaðum"

Idugnaligt og kveikjandi umhvørvi mitt í býnum í Fuglafirði.



www.ribarhus.com



MASSAGU & ZONETERAPI

Hevur tú brúk fyri massagu ella zoneterapi so ring - 214692 - Ingunn






# ÍF SØKIR HJÁLP TIL MARKNAÐARFØRING

**Nú ÍF á øðrum árið á rað, eru í bestu fótbólts-deildini í Føroyum, er tað sera umráðandi at liðið og felagið verður marknaðarført væl og virðiliga. Á hesum øki hava vit verið væl aftanfyri nógv onnur feløg í Føroyum, og tað eru vit sera harm um. Hetta hava vit ætlanir um at broyta, men vit klára tað ikki einsamøll.**

**HEIMASÍÐAN**

Fyri akkurát einum árið síðani, var nýggj heimasíða bíløgd frá Knassar.com. Hendan heimasíðan skuldi vera nýggja andlitið hjá ÍF fótbólti, og vóru vit øll sera spent uppá hana. Heimasíðan kom fram í øllum góðum, men tað sum vit ikki høvdu hugsa ov nógv um var, at onkur mátti dagføra síðuna allatíðina, fyri at fólk skuldi tíma at vitja hana, og fyri at vit kunnu brúka síðuna sum informatión til øll børn, ung og vaksin til allar tíðir. Her hava vit brúk fyri tínari hjálp.

**ÍF LEIKSKRÁIN**

Júst nú stendur tú og lesur í ÍF leikskránni. ÍF leikskráin verður útgivin til hvønn heimadyst hjá ÍF, fyri at allir áskoðarar skulu fáa tey mest umráðandi tingini at vita um dystin í dag. Eisini dáma nógvir áskoðarar væl, um ymiskt annað stendur at lesa í leikskránni. Í løtuni er bert ein persónur knýttur at leikskránni hjá ÍF, men sera gott hevði verið, um onkur kundi hjálpt til við at skriva ymiskt til leikskránna. Her hava vit eisini brúk fyri tínari hjálp.

Á hesum báðum økjunum mangla vit serkøna hjálp, og um tú ert áhugað/ur ella kennur onkran sum hevði verið áhugað/ur, at dagført heimasíðuna www.if.fo og leikskránna hjá ÍF, høvdu vit verið sera fegin at hoyrt frá tær. Ikki hugsa um aldur ella royndir, vit hava brúk fyri tínari hjálp óansæð.

**Ring 541216 ella send ein teldupost á olavur@dimma.fo**





Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið

SVENDKROSSTEIN

Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo

**Fuglafjarðar Keypssamtøka**
Tel 444095
Fax 444895 Far 217095

**P/F Kári Zachariassen**



Hogni
Far. 284245

Kári
Far. 284245

*Hvat kunnu vit ikki klára við Kára*




Norður í Gerði 7 | FO-530 Fuglafjørður | Faroe Islands
Phone: +298 44 41 21 or +298 59 59 00 | www.sandship.fo

**VINNAN**

**M/S TRÓNDUR Í GØTU • M/S FINNUR FRÍÐI**
**M/S JUPITER • M/S SAKSABERG**

# MINNINGARORÐ UM JÓHANNES HJÁ OLGU

Tungt var at frætta, at Jóhannes hjá Olgu var farin bert 57 ára gamal. Hann var so væl upplagdur og so lættur av lyndi, at neyvan nakar annar enn tey, ið stóðu honum heilt nær, vistu, at hann var álvarsliga sjúkur. Hann gramdi seg ongantíð, læt altíð væl at og spardi seg ongantíð.
Jóhannes var ættaður úr Runavík, sonur Ansy og Jóhan Hansen, vanliga nevndur Jóhan í bankanum. Hann var næstelstur í stórum systkinaflokki.
Jóhannes hevði stóran áhuga fyri ítrótti. Sjálvur var hann á ungum árum ein góður fótbóltsspælari. Sum ungur íðkaði hann eisini fimleik, og tá ið gongd kom á fimleikin í Fuglafirði, so mundi Jóhannes vera ein teirra, ið gjørdi tað møguligt við einum fimleikafelagi í bygdini. Jóhannes dugdi væl at fara við ungfólki, og var hann sera væl lýddur av teimum.

Áhugin fyri fótbólti var stórur. Hvønn einasta sunndag, tá ið besta deild ÍF's spældi, so var Jóhannes staddur á bakkanum. Leygardagar, tá ið yngru liðini spældu, so var Jóhannes við vøllin.Hann hevði skil fyri fótbólt, fylgdi væl við, og hevði sínar meiningar um, hvussu spælast skuldi. Hann var altíð áhugaverdur at lurta eftir, tí hann var so skilagóður og gløggur.

Jóhannes hevði so stóran áhuga fyri teimum yngru deildunum, tí hann visti, at skuldu góð úrslit spyrjast burturúr, so var neyðugt at byrja tíðliga. Hetta er galdandi fyri allar ítróttargreinir. Hann vandi yngri lið, og barst tað øðrum frá at venja, so var Jóhannes altíð fúsur at taka yvir.

Svimjingin átti eisini hansara stóra áhuga, og at yngsta dóttir hansara Jónfríð tók lut í hesi grein, gjørdi áhugan uppaftur størri. Varð farið av bygdini til kappingar, so var Jóhannes og Olga altíð tilreiðar við farti. Hann hevði sínar tankar um, hvussu ítróttin kundi styrkjast í okkara øki: Hann tosaði mangan um eitt tættari samstarv millum bygdirnar, ið hann dugdi at síggja, vildi gagna øllum bygdunum, tá ið tað snúði seg um ítrótt og skúlamál.
Jóhannes arbeiddi sum fíggjarleiðari hjá fyritøkuni K:J: á Kambsdali og varð hann eisini her sera væl umtóktur av arbeiðsfólkinum og leiðsluni.

Ítróttin í okkara bygd ella býi hevur mist ein av sínum dyggu stuðlum, ein stuðul, ið arbeiddi í tí stilla, og sum ongantíð legði í, sjálvur at verða sæddur.
Missurin av hesum manni, er stórur fyri ítróttina í Fuglafirði, ítróttarfólkið, ikki minst tey yngru, fara at sakna hann.
Men samstundis vita vit, at saknurin og missurin hjá konu, børnum, abbabørnum og øðrum, tykkum sum hann helt so ómetaliga nógv av og setti í fremstu røð, verður uppaftur størri og tyngri,

Okkara tankar leitar til tykkara, ið er rakt av djúpari sorg.
Vit lýsa frið yvir minnið um Jóhannes, og ynskja at hann, ið øllum valdar, gevur tykkum, ið eru so hart rakt av sorgini, styrki at halda fram.

ÍF






BÓNUS
Hví gjalda meira...
-er bíligari!


SMART OG LEKKURT TIL ÍTRÓTT OG FRÍTÍÐ...
SPORTMASTER
Kloksvíksvegur 10 - Tel. 470470 - 700 Klaksvík - hp@sportmaster.fo


café
Bedura
buffet
hvønn gerandisdag 11[30]-13[00]
brunch
leygarmorgun 11[00]-13[00]
Heiðavegur 51 • Saltangará • Tel 449808


POUL JOENSEN
LAST & KRANAVOGNSKOYRING


POUL JOENSEN
AVSKERING AV SKRÚÐUM

Í fjør hevði B36 ein rættuliga sterkan hóp, har teir kanska ikki vóru so tungir í álopinum, men høvdu eina sterka verju og høvdu tol at spæla fótbólt. Í ár hava teir mist onkran av lyklaleikaranum, og hava fingið erstatning á tey flestu plássini. Meinhardt Joensen er farin til NSÍ, Odmar Færø til Brøndby, Alex José Dos Santos til EB/Streym, Dimitri Jankovic til heimlandið og Ingi Højsted er ikki í hópinum vegna skaða. Hetta má sigast at vera sera tungir dreingir at missa í einum. Onkrir nýggir leikarar eru tó komnir til felagið; tað eru kanska ikki líka stór nøvn sum teir sum er farnir, men teir skulu nokk styrkja um B36 hópin. Hesir eru, Brima Koroma (áleypari úr Sierra Leone) ið áður hevur spælt í bestu svensku deildini, Allsvenskan, Fróði Clementsen ið m.a. gjørdist greipuvinnari við EB/Streymi í fjør, Suni úr Hørg ið var í miðverjuni hjá VB/Sumba í alt fjør og so hava teir styrkt seg við unga miðvallaranum Janus Mortensen og verju/álopsleikaranum Poul Arna Jacobsen. Nýggir venjarar eru eisini komnir til Vodafoneliðið hjá B36, teir eru Mikkjal Thomassen og Milan Cimburovic. Mikkjal er væl kendur sum leikari hjá HB, B36, EB/Streymi og frá føroyska landsliðnum, men hevur ongar venjararoyndir. Milan hevur bert venjararoyndir frá ungdómsfótbóltinum hjá B36, so tað verður spennandi at síggja, hvussu óroynda venjaraparið fer at klára seg í Vodafonedeildini í ár, tí nógvar broytingar eru frá í fjør og venjaraparið ungt og spennandi.

Hjá ÍF hevur tað gingið júst mótsatt B36. ÍF tapti fyrsta umfar í Vodafonedeildini 2-0 á Sarpugerði ímóti Víkingi, men megnaðu at leika seg víðari í steypakappingini á útivølli ímóti B71 Heima á Sandi. Dysturin endaði 0-1 til ÍF, við einum málið frá Jonn Thomsen - ja tú læs rætt, Jonn Thomsen!

ÍF hevur eisini nógvar boytingar í hópinum í ár. Tilgongdin er tó størri enn frágongdin. Poul Ennigarð og Hans Paule Petersen eru komnir úr Gøtu, har teir hava sera drúgvar royndir á besta liðnum hjá GÍ. Viggo Johannesen er afturkomin úr NSÍ og Høgni Zachariassen og Hanus Eliasen eru afturkomnir eftir ávíkavíst 1 og 2 ár í EB/Streymi, har teir vunnu greipuna í fjør. Landsliðstoppskorarin, Rógvi Jacobsen, er

***Dysturin endaði 0-1 til ÍF, við einum málið frá Jonn Thomsen - ja tú læs rætt, Jonn Thomsen!***

eisini komin til Fuglafjarðar at spæla í ár, men hann hevur verið langtíðarskaddur, so eingin veit hvat fer at spyrjast burturúr honum hetta kappingarárið - man kann bert vóna, at hann kemur fyri seg skjótt. Nýggjur venjari er eisini í Fuglafirði, sjálvt um hann ikki er heilt ókendur sum venjari í Fuglafirði. Jón Simonsen hevur fingið kjansin, at taka sær av Vodafoneliðnum hjá ÍF í ár, og hetta hevur hann fingið Roy Róin at hjálpa sær við. Man kann ikki siga, at venjaraparið hjá ÍF hevur drúgvar royndir á hægsta stigið, men Jón hevur verið venjari í 4 ár hjá ymsum liðum í Fuglafirði, og Roy hevur spælt á besta liðnum hjá ÍF í nógv ár og var hjálparvenjari hjá ÍF ígjøgnum alt árið í fjør.

Spælið hjá ÍF hevur ikki verið líka yvirbevísandi í ár, sum nógvir fuglfirðingar væntaðu áðrenn fyrsta dyst, men kappingin er akkurát byrja, so spælið og málini skulu nokk fara at koma.

B36 koma til Fuglafjarðar í dag, har teir nokk fara at royna at fáa sær øll trý stigini við sær heimaftur, men heimavøllurin á Fløtugerði hevur sum oftast verið "Borgin" hjá ÍF, og hetta er fyrsti dystur á heimavølli í ár, so ÍF'ararnir fara nokk eisini eftir øllum trimum stigunum í dag. Spennandi verður at síggja, um annað av liðunum tekur sær trý stig ella tey velja at deila stigini ímillum sín.

**Góðan dyst øll somul!**



P/f Sveisingahandilin

Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 311909






**AÐRIR DYSTIR**
**Í VODAFONEDEILDINI 2. UMFAR**

13/04 HB - EB/STREYMUR
13/04 KÍ - VÍKINGUR
13/04 07 VESTUR - NSÍ
13/04 B68 - AB

**NÆSTA UMFAR**
**Í VODAFONEDEILDINI**

17/04 VÍKINGUR - 07 VESTUR
19/04 EB/STR. - B68
19/04 B36 - KÍ
19/04 AB - ÍF
20/04 NSÍ - HB

**ÍF FÓTBÓLTUR**
Postboks 94 • 530 Fuglafjørður
Tel 444 636 • Fax 444 634
www.if.fo • if@if.fo

**LEIKSKRÁ 1**
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur
**Ábyrgd:** ÍF fótbóltur
**Blaðnevnd:** Ólavur Larsen
**Myndir:** Kjartan Madsen
**Kápumynd:** Kjartan Madsen
Atli tekur bóltin við bringuni, ímeðan Hanus Thorleifsson(B36) seisini roynir eftir bóltinum. Nenad Saric og Jan Ellingsgaard standa í bakgrundini.
**Uppsetan:** www.regve.com

**vodafone | deildin**

| Nr. | Lið | D | V | J | T | Vm | Tm | +/- | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 | Víkingur | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 | B36 | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 4 | EB/Str. | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 5 | KÍ | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 | NSÍ | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 | AB | 1 | 0 | 0 | 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 8 | 07 Vestur | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 9 | B68 | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| **10** | **ÍF** | **1** | **0** | **0** | **1** | **0** | **2** | **-2** | **0** |

# DAGSINS MANNINGAR

1. Andras Gango
2. Áki Petersen
3. Jan Ellingsgaard
4. Nenad Saric
5. Jonn Thomsen
6. Bartal Eliasen
7. Aleksandar Jovevic
8. Fritleif í Lambanum
9. Rógvi Jacobsen
10. Hanus Eliasen
11. Frank Poulsen
12. Viggo Johannesen
13. Hans Paule Petersen
14. Dánjal á Lakjuni
15. Poul Ennigarð
17. Balazs Sinko
18. Vincent Jacobsen
19. Atli Petersen
20. Uni R. Petersen
21. Ari Ó. Ellingsgaard
22. Høgni Zachariassen
23. Andy Olsen
24. Hilmar Petersen

**Venjari:** Jón Simonsen
**Hjálparvenjari:** Roy Róin
**Liðleiðari:** Tórstein Joensen

1. Jóan Pauli Jakobsen
2. Uni H. Johannesen
3. Høgni Eysturoy
5. Poul Arni Jacobsen
6. Hanus Thorleifsson
7. Bergur Midjord
8. Fróði Clementsen
9. Jákup á Borg
10. Róaldur Jacobsen
11. Brima Koroma
12. Jóhan Ellingsgaard
13. Súni úr Hørg
15. Janus Mortensen
16. Tróndur Vatnhamar
17. Bogi Hermansen
18. Magnus Olsen
19. Rúnar í Lon Jacobsen
22. Klæmint Matras
23. Sam Malsom
24. Ásbjørn V. Gunnarsson
28. Herbert í Lon Jacobsen

**Venjari:** Mikkjal Thomassen
**Hjálparvenjari:** Milan Cimburovic

Dómari, hjálpardómarar og eygleiðari
vóru ikki settir áðrenn leikskráin fór til prent

Dystarbólturin í dag er stuðlaður av
**Royndini Fríðu v/Elibert Jacobsen**